**Námsfrøðiligt stuðulsstarv í Kollafjarðar skúla**

Eitt starv sum námsfrøðiligur stuðul hjá trimum næmingum við serligum tørvi í vanligum flokkum er leyst at søkja. Talan kann tó eisini vera um tvíbýtta setan av starvinum.

Høvuðsuppgávan er at ráðleggja, gjøgnumføra og eftirmeta skúladagin hjá næmingunum í samstarvi og samráði við førleikastovu skúlans og viðkomandi lærarum. Arbeitt verður út frá einstaklinga læruætlanum.

Førleikakrav:

Útbúgving sum námsfrøðingur krevst, tó kunnu aðrir umsøkjarar eisini søkja starvið. Tað kann vera ein fyrimunur at hava starvsroyndir við børnum við autismu ella líknandi avbjóðingum.

Lønar- og setanartreytir:

Starvið verður sett sum sáttmálasett starv og verður lønt sambært avtalu millum Føroya pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 11 - 21.

Setanarbrotið er 0,85 svarandi til 1434 árstímar. Um starvið verður tvíbýtt er setanin uml. 0,6/0,3.

Umsóknin, við CV, avriti av prógvum og møguligum ummælum, skal vera stjóranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. juni 2018 kl. 12:00.

Umsóknin skal stílast til:

Kollafjarðar skúla
att.: Jón Højsted, skúlastjóri
Botnavegur 2
FO-410 Kollafjørður

Umsóknin kann eisini sendast við telduposti til: jon.hojsted@skulin.fo.

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Jón Højsted á telefon 21 14 87.